# Bjóðar sína vitan út

**Fráfarandi strandferðslustjórin fer at bjóða sína vitan út á privata arbeiðsmarknaðinum, tá hann leggur verandi starvið frá sær. Hann fer ikki at verða stjóri á Fiskasøluni, sum leysasøgur vilja vera við, sigur hann**

STARVSSKIFTI
*Edvard Joensen*

Reidar Nónfjall, fráfarandi strandferðslustjóri, fer at bjóða seg fram sum ráðgeva í privata vinnulívinum. Onkur áheitan er komin, sigur hann, men eingin ávísur stólur stendur og bíðar honum nakrastaðni.

Tað kom eitt sindur óvart á fólk, tá stjórin á Strandfaraskipum Landsins týsdagin boðaði frá, at hann hevur biðið um at verða loystur úr starvinum.

Gitingar fóru beinanveg í gongd um, hvar hann mundi fara, og nærliggjandi var at hugsa, at hann kanska fór at gerast komandi stjórin á Føroya Fiskasølu.

Men hesum gitingum vísa bæði nevndarformaðurin á Fiskasøluni, Hákun Steingrímsson, og Reidar Nónfjall sjálvur frá sær.

–Tað hevur als ikki verið upp á tal, og tað fer ongantíð at henda heldur, svarar Reidar Nónfjall av gjørdur spurninginum.

Hann letur tó skilja, mestsum millum reglurnar, at hann hevur í huga at fara undir eitthvørt ráðgevingavirksemi.

Vinnuliga undirvísing kallar hann tað og rør líka sum uppundir, at talan væl kann fara at verða um eitt sjálvstøðugt ráðgevingarvirki.



*Reidar Nónfjall hevur sagt seg úr starvinum sum stjóri á Strandfaraskipum Landsins. Hann ætlar sær undir vinnuliga undirvísing, sum hann tekur til, og letur skilja, at talan kann gerast um at seta egið ráðgevingarvirki á stovn. Eingin nýggjur stjórasessur bíðar honum, sigur hann.*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

## Nýggjur kapittul

–Eg havi býtt lívið í kapitlar ásannandi, at tað er ikki so øgiliga langt, sigur Reidar Nónfjall og nevnir í tí sambandi tveir teir seinastu kapitlarnar, ið verið hava. Tíðina hann starvaðist í umsitingini í Tinganesi og tíðina sum strandferðslustjóri.

– Nú eri eg vorðin 40 ár, og meti tíð vera at blaða víðari til næsta kapittul, sigur Reidar Nónfjall. Eg haldi, at eg eigi at gera tað nú, meðan eg enn eri førur fyri at taka við nýggjum avbjóðingum. Eg havi fylgt við, hvat hendir við mær sjálvum og rundan um meg, og eri komin til ta niðurstøðu, at tað er nú, skiftast skal.

– Eg havi tikið nógvar avgerðir í mínum starvi, og nú var so tíðin komin til at taka eina avgerð um mín egna persón, sigur fráfarandi strandferðslustjórin.

Hann sigur, at tað, hann er á veg til, er ikki nakað, sum líkist hesum starvinum, hann nú fer úr. Tað eru heilt aðrar vinnugreinar, sum talan er um. Og kortini roknar hann við, at júst royndirnar á Strandferðsluni skulu kunna brúkast í víðari virki hansara.

Hóast hann nú fer úr stjórastarvinum á Strandfaraskipum Landsins, sigur hann seg vera fúsan at standa til taks hjá stovninum, um brúk verður fyri honum. Hann vil fegin kunna hjálpa sínum eftirmanni ávegis, sum hann tekur til. Millum annað við at fortelja honum, hvussu ein yvirlivir í eini slíkari skipan sum hesari.

## Spennandi og strævið

At leiða ein stovn sum Strandfaraskip Landsins er bæði spennandi og strævið, ásannar Reidar Nónfjall. Tað stendur nógv á viðhvørt. Serliga fyrsta tíðin í stjórastarvinum var øgiliga tyngjandi persónliga, sigur hann.

Seinni er tað komið í fastari legu, og í dag metir hann, at hann hevur rokkið teimum málum, hann fyri umleið seks árum síðan sum nýsettur stjóri setti sær. So er bara eitt at gera, og tað er at fara at leita eftir nýggjum málum. Tey síggjast nú úti í sjónarringinum, og hann hevur loyst og er á ferð móti teimum.

Bygnaðurin á Strandferðsluni við eini trýbýttari samferðslu, sum kortini skal vera ein eind, er genialur, sigur Reidar Nónfjall. Men tað er tungt at skula hugsa í trimum brotum alla tíðina. Tú skal reka eitt ferjureiðarí, eina bussfyritøku og eina lastbilafyritøku samstundis.

– Men tað hevur borið til, og er nú komið í so mikið trygga legu, at eg meti mína uppgávu her vera avgreidda, sigur hann.

Reidar Nónfjall skal sambært uppsagnarfreistina sita í starvinum til nýggjárs. Men hann hevur heitt á arbeiðsgevaran, sum er landsstýrismaðurin við vinnumálum, um at sleppa fyrr úr starvi. Samráðst verður nú um hetta, sigur hann.

# Atli Dam 70

Halgabók sum yrkjarin siga tey sjúti árini virkna lívsskeið manna at vera.

Í dag 12. september er hetta markið rokkið hjá Atla Dam.

Hóast hann ikki ger hóasták burtúr sjálvum degnum, ger hann tað í heimbygd síni Tvøroyri nú leygardagin 14. september.

Atla Dam kenna føroyingar allir sum maðurin, ið tók upp á seg politiska leiðarastarvið í Javnaðarflokkinum í 1970. Og bar hann kappan sum Føroya løgmaður tey týdningarmiklu árini, tá stóru umskiftini vóru:

*Støðutakanin Føroyar og Felagsmarknaðurin og samráðingarnar nógvu og drúgvu í tí sambandi –*

*Víðkanin av sjómarkinum og nógvu samráðingarnar í tí viðfangi –*

*Mongu samráðingarnar um fiskivinnurættindi føroyinga við londini vit samstarvaðust við á altýðandi vinnuøki okkara –*

*Samráðingarnar og nógvu fyrireikingarnar um rættindi til ríkidømi í føroysku undirgrundini og sum gjørdust bjarti verunleikin júst í hesum mánaðinum fyri 10 árum síðani.*

Sum oddamaður og framherji fyri hesum meginmálum Føroya var Atli Dam maðurin, sum ótroyttiliga og skilaliga legði til rættis og fylgdi málunum í øllum liðum og lykkjum, til úrslit spurdust burturúr.

Stór umskifti vóru tey mongu árini Atli var floksleiðari og oddamaður í politisku leiðslu landsins langt áramál.

Tá óføru kreppubrotini skolaðu yvir samfelagið í síðstu áttatiárunum og fyrstu nýtiárunum í farnu øld, var Atli Dam politikarin, ið mestsum einsamallur fekk holvda niðuryvir sín kropp ábyrgdina av gongdini.

Væl sannari mynd enn tann dómur veljarafjøldin gav Atla í 1994, man søguskrivingin fara at geva av honum.

Tey mongu árini í aktivum politikki á odda í landspolitikki og sum floksformaður, gav Atli mátt og megi sína alla, hann gjørdi sítt verk til lítar.

Sama er at siga um árini, hann hevur stjórna Realkredittstovninum.

Hjartaligu lukkuynski, Atli og góðan byr.

**jl**





# Royna at fáa kabalina at ganga upp

TALUTRUPULLEIKAR
*Ingrid Bjarnastein*

Í gjár skrivaðu vit, at seinasti talulærarin í Tórshavnar Kommunu nú fer at leggja frá sær vegna ov stóra arbeiðsbyrðu. Tað eydnaðast okkum ikki at fáa viðmerking frá landsstýriskvinnuni í undirvísingar- og mentanarmálum í gjár, men í dag gekst betri.

– Tað er ikki til at liva við, at ongin talulærari er til alt smábarnaøkið í høvuðsstaðarøkinum, og tí verður málið tikið upp, har tað verður farið inn og hugt eftir raðfestingini av pengunum hjá Sernámsdeplinum, sigur Annlis Bjarkhamar, landsstýriskvinna í undirvísingar- og mentanarmálum.

Landsstýriskvinnan heldur, at tað er ov lætt at beinanvegin skjóta skyldina yvir á politikararnar, og tí vil hon fyrst hyggja, hvussu pengarnir á stovninum verða raðfestir, og um stovnurin veruliga hevur tørv á meira pengini.

– Eg haldi ikki, at loysnin til alt er at geva meira pening, og tí er tað týdningarmikið at fáa at vita, hvussu peningurin verður nýttur.

– Sernámsdepilin fær eina játtan, sum tey skulu umsita, og tað er har eg ætli mær at vita, hvussu raðfestingin er, og harvið vita, um tað ber til at fáa kabalina at ganga upp.

Annlis Bjarkhamar slær tó fast, at tað nýtist als ikki at vera nakað galið við raðfestingini, men hon er sannførd um, at ein eigur fyrst at hyggja eftir, hvagar peningurin fer.



*Annlis Bjarkhamar vil vita, hvussu peningurin hjá Sernámsdeplinum verður raðfestur, áðrenn nakað ítøkiligt verður gjørt við trupulleikan, at ongin talulærari er í høvuðsstaðarøkinum í løtuni*

*Savnsmynd*

**Støðleiðari til Shell í Klaksvík**

Í sambandi við at P/F Føroya Shell yvirtekur Shell Quick Service frá Dávu Joensen og at avgreiðsluskrivstovan í Norðoyggjum samstundis verður flutt av Grótrætt inn á støðina, verður við hesum søkt eftir leiðara.

**Starvið:**
Vit kunnu bjóða eitt sera spennandi starv, sum bæði fevnir um dagligu leiðsluna av Shell-støðini, av øllum søluarbeiðinum, rakstrinum og av umsiting okkara í Norðoyggjum. Samstundis umfatar starvið eisini ábyrgdina av goymsluni á Grótrætt.

**Eginleikar:**
Vit ímynda okkum at umsøkjarin

- hevur góð leiðsluevni
- er ein góður seljari
- er íðin og ágrýtin
- dugir at arbeiða sjálvstøðugt
- er miðvísur og framsøkin
- hevur staðkunnleika
- er fjølbroyttur og smidligur
- hevur ordanssans
- er dugnaligur í samstarvi við viðskiftafólk og starvsfelagar
- tekur undir við handilsmeginreglunum hjá Shell (sí www.shell.fo)

**Løn:**
Vit bjóða eina góða løn við eftirlønarskipan, ið verður ásett í samsvari við útbúgving og royndir.

**Umsóknir:**
Áhugað kunnu senda umsókn við neyðugum skjølum og merkt "Leiðari Klaksvík" til P/F Føroya Shell, Við Sandvík, 100 Tórshavn, í seinasta lagi 30. sept. 2002. Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði. Fyrispurningar viðvíkjandi starvinum kunnu setast til Erling í Liða, sølu- og marknaðarleiðara ella Hákun Djurhuus, stjóra á telefon 347400.

P/F Føroya Shell hevur deildir í Klaksvík, Suðuroy, Eysturoy og Tórshavn. Tað eru 10 Shell-støðir kring landið og uml. 100 fólk starvast hjá Shell í Føroyum. Shell eigur og rekur eisini tangabátin "MAGN". Árliga umsetur Shell fyri uml. 400-500 mió. kr. Virksemið hjá Shell í Føroyum hevur síðani 1973 verið í føroyskum partafelag, sum er ein partur av Royal Dutch Shell.

www.shell.fo

**Vælkomin í føðingardag!**

**Eg haldi føðingardag frá 16. til 20. september! Í føðingardagsvikuni vitji eg allar Føroya Banka-deildirnar. Kom inn og ynsk mær tillukku! Hevur tú sparikistilin við, seta vit peningin inn á tína Nósakonto, og tú fært eina føðingardagsgávu við heim aftur!**

**Her sært tú, nær eg vitji tína deild:**

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| Norðuroyggjar | Klaksvík | Týsdagin | 17-09-02 | kl. 10.30-11.00 |
| | Klaksvík | Týsdagin | 17-09-02 | kl. 14.30-15.30 |
| Eysturoy | Eiði | Mánadagin | 16-09-02 | kl. 13.00-14.00 |
| | Norðskáli | Mánadagin | 16-09-02 | kl. 14.30-15.30 |
| | Gøta | Mánadagin | 16-09-02 | kl. 13.00-14.00 |
| | Leirvík | Mánadagin | 16-09-02 | kl. 14.30-15.30 |
| | Fuglafjørður | Mikudagin | 18-09-02 | kl. 14.30-15.30 |
| | Saltangará | Hósdagin | 19-09-02 | kl. 10.30-11.00 |
| | Toftir | Hósdagin | 19-09-02 | kl. 14.30-15.30 |
| | Saltangará | Hósdagin | 19-09-02 | kl. 16.30-17.30 |
| | Skáli | Fríggjadagin | 20-09-02 | kl. 13.00-14.00 |
| | Strendur | Fríggjadagin | 20-09-02 | kl. 14.30-15.30 |
| Vágar | Miðvágur | Hósdagin | 19-09-02 | kl. 14.30-15.30 |
| | Sandavágur | Hósdagin | 19-09-02 | kl. 16.00-17.00 |
| | Sørvágur | Fríggjadagin | 20-09-02 | kl. 13.00-14.00 |
| Sandoy | Skopun | Fríggjadagin | 20-09-02 | kl. 14.00-14.30 |
| | Sandur | Fríggjadagin | 20-09-02 | kl. 15.00-15.30 |
| Suðuroy | Hvalba | Mánadagin | 16-09-02 | kl. 13.00-13.30 |
| | Vágur | Mánadagin | 16-09-02 | kl. 14.30-15.30 |
| | Tvøroyri | Týsdagin | 17-09-02 | kl. 14.30-15.30 |
| Streymoy | Vestmanna | Týsdagin | 17-09-02 | kl. 14.00-15.00 |
| | Kollafjørður | Mikudagin | 18-09-02 | kl. 14.30-15.30 |
| | N.Finsensgøta | Hósdagin | 19-09-02 | kl. 10.30-11.30 |
| | Hornabøur | Hósdagin | 19-09-02 | kl. 13.00-14.00 |
| | SMS | Hósdagin | 19-09-02 | kl. 14.30-15.30 |
| | N.Finsensgøta | Hósdagin | 19-09-02 | kl. 16.30-17.30 |

